NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2016

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

## Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR | s. | 7 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI OG SOLVENSTØRVI | s. | 9 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 10 |
| NOTUR | s. | 11 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2016 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2016.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 5. august 2016.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Karl Heri Joensen | Petur Alberg Lamhauge | Frimodt Rasmussen |
| Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Janus Joensen |

# Hálvársfrágreiðing

## Fyrra hálvár í yvirskriftum - vøkstur og tryggleiki

- Avlop eftir skatt 9,6 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt 4,8 %
- Útlánini øktust 3 %
- Innlánini øktust 3,4 %
- Ábyrgdarfæið øktist 5,2 %
- Útlánsprosentið 82,4 %
- Gjaldførisyvirdekningurin (§ 152) 169 %
- Solvensurin 18,1 %
- Solvenstørvurin 9,1 %
- Solvensyvirdekningurin 9 %-stig

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla, professionella ráðgeving.

## Gongdin fyrra hálvár

Úrslitið eftir skatt var eitt avlop á 9,6 mió. kr. móti 6,2 mió. kr. sammett við sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein øking upp á 3,4 mió. kr. Eginognin rentaði við 4,8 % fyrra hálvár og er nú 203,6 mió. kr.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 7,5 mió. kr. móti 8,1 mió. kr. fyri sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein minking í vanliga rakstrinum upp á 0,6 mió. kr., sum stavar frá, at inntøkurnar lækkaðu við 1 mió. kr., meðan útreiðslurnar lækkaðu 0,4 mió. kr.

Rentustøðið er lækkað enn meiri higartil í ár, og kappingin um kundarnar er framvegis hørð. Sparikassin hevur sum mál at vera kappingarførur og harvið at vera við í kappingini um kundarnar. Hetta sæst eisini aftur í roknskapinum, har út- og innlán øktust ávikavist 3 % og 3,4 %. Til at fíggja kappingina um kundarnar hevur sparikassin fyrra hálvár tillagað rentuna, men meginparturin av hesi tillaging, saman við økta virkseminum hjá sparikassanum, fær ikki fullan virknað fyrr enn í roknskapinum fyri seinna hálvár.

Á aðalfundinum í mars samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri árið 2015 við 5 prosentum yvir ta til eina og hvørja tíð galdandi hægstu rentu fyri innlán upp á 12 mánaðir ella í miðal við 5,87 prosentum. Sparikassans politikkur fyri 2016 er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi verður 5 prosent. Ábyrgdarar kunnu í mesta lagi eiga kr. 300.000 í ábyrgdarpeningi, uttan at loyvi krevst frá nevndini.

Fíggjareftirlitið hevur 27. juni endurútnevnt sparikassan til framvegis at vera serliga týðandi peningastovnur í Føroyum. Grundað á sparikassans virksemi verður sparikassin mettur at hava so mikið stóran týdning fyri samfelagið, at hann er endurútnevndur sum týðandi peningastovnur – sokallaðan SIFI-peningastovn. Harvið eru serlig krøv áløgd sparikassanum til kapital og gjaldføri v.m., ið skulu tryggja sparikassan uppaftur betri.

Gongdin í fyrra hálvári hevur sum heild verið í samsvari við metingar sparikassans, og er sparikassin væl nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 32,4 mió. kr. í mun til 33,2 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Tað er ein afturgongd upp á 0,8 mió. kr. Økta virksemið sæst tó aftur í netto rentuinntøkunum, sum øktust við 0,3 mió. kr. Harafturímóti lækkaðu netto kostnaðar- og provisjónsinntøkur við 1,1 mió. kr., sum stavar frá eingangsinntøkum, sum sparikassin hevði í fyrra hálvári 2015.

### Virðisjavnan

Virðisjavnin vísir eitt avlop upp á 2,6 mió. kr. sammett við eitt lítið hall sama tíðarskeið undanfarna ár upp á 71 tkr. Høvuðsorsøkin til avlopið stavar frá virðisjavnan av lánsbrøvum, sum avleiðing av at rentustøðið er lækkað enn meira fyrra hálvár í ár. Harafturímóti hevði sparikassin eitt hall av virðisjavnan av óskrásettum partabrøvum upp á 113 tkr. Sparikassin eigur bert partabrøv í Elektron, SDC og DLR Kreditt, sum øll eru feløg sum sparikassin samstarvar við.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslurnar til starvsfólk og fyrisiting hækkaðu úr 24,0 mió. kr. upp í 24,9 mió. kr. Hækkingin upp á 0,9 mió. kr. stavar í høvuðsheitum frá hægri útreiðslum til lønir og sosialar veitingar, sum øktust við 0,7 mió. kr. Útreiðslur til fyrisiting øktust við 0,2 mió. kr. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár hækkaði við 0,9 ársverkum úr 41,8 upp í 42,7 sammett við sama tíðarskeið í fjør.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Hesin postur fevnir um gjald til Innskjótaratrygdargrunnin og útgjald úr gávugrunninum, sum fyrra hálvar var 25 tkr. Skipanin við Innskjótaratrygdargrunninum fyri tíðarskeiðið frá 2012 til 2015 var eitt samlað gjald upp á 1 % av sparikassans dekkaðu nettoinnlánum, sum var goldið yvir hesi 4 árini. Fjórða og seinasta gjaldið var í 2015 og var gjaldið fyri fyrra hálvár 1,4 mió. kr. Nýggj skipan fyri Innskjótaratrygdargrunnin er sett í verk í Danmark og væntast at verða sett í gildi fyri Føroyar seinni í ár. Gjaldið eftir hesi skipan verður munandi lægri.

### Niðurskrivingar

Fyrra hálvár í ár niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir við 0,5 mió. kr., sum er 1,3 mió. kr. minni í mun til fyrra hálvár í fjør, tá ið niðurskrivingarnar vóru 1,8 mió. kr. Sparikassin hevur framt stórar niðurskrivingar seinastu árini, men gongdin í niðurskrivingum seinasta árið ber boð um, at útlit eru fyri, at niðurskrivingarnar komandi árini fara at verða á einum lægri støði, enn vit kenna tað frá undanfarnum árum.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans øktist við 52 mió. kr. 1. hálvár 2016, úr 2.234 mió. kr. og upp í 2.286 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 2,3 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarstøðuni er økta virksemið hjá sparikassanum, har út- og innlán øktust ávikavist 3 % og 3,4 %. Innlánini øktust við 67 mió. kr., úr 1.973 mió. kr. við árslok 2015 og upp í 2.040 mió. kr. 1. hálvár 2016. Útlánini øktust við 48 mió. kr., úr 1.598 mió. kr. við árslok 2015 og upp í 1.646 mió. kr. 1. hálvár 2016.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 169 % ímóti 154 % við ársenda í fjør - hetta er ein øking uppá 15 % -stig. Sambært eftirlitsdiamantinum hjá Fíggjareftirlitinum er minstamarkið fyri yvirdekningi 50 %.

### Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 18,1 %, sum er tað sama somu tíð í fjør.

Individuelli solvenstørvurin var uppgjørdur til 9,1 % 1. hálvár 2016, ið er 0,5 % -stig lægri enn við somu tíð í fjør, tá ið hann var 9,6 %. Orsøkin til lækkingina í solvenstørvinum stavar frá, at kredittgóðskan á kundum sparikassans er vorðin enn betur, og metir sparikassin seg verða komnan á mál á hesum øki.

Sostatt hevur sparikassin ein solvensyvirdekning pr. 1. hálvár 2016 upp á 9 % -stig, móti 8,5 % -stigum somu tíð árið fyri.

## Meting fyri 2016

Fyrra hálvár 2016 var avlopið 7,5 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Inntøkurnar fyri 2. hálvár verða mettar at verða á einum hægri støði enn 1. hálvár, og væntar sparikassin, at tillagingar í rakstrinum 1. hálvár fara at síggjast aftur í rakstrinum 2. hálvár.

Í ársfrásøgnini fyri 2015 varð mett, at úrslitið fyri alt árið 2016 fór at vera eitt avlop av vanligum rakstri upp á umleið 19 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Nú árið er hálvrunnið er sparikassin framvegis av tí fatan, at metingin fer at halda.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar tilsamans** (skulu vera minni enn 125 % av basiskapitalinum): Stórir kundar tilsamans pr. 30. juni 2016 eru uppgjørdir til 46,3 % av basiskapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár í 2016 ein útlánsvøkstur upp á 3 %.
- **Útlán til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av samlaðu útlánunum): Pr. 30. juni 2016 vóru útlán sparikassans til fastognir 5,6 % av samlaðu útlánunum.
- **Fíggjarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,7 pr. 30. juni 2016.
- **Gjaldførið yvir lógarinnar kravi** (skal vera størri enn 50 %): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2016 uppgjørt gjaldførið yvir lógarinnar kravi til 169 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2015.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30. juni 2016 hava ongar hendingar verið, sum ávirka fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum eru nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2016. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2015.

# Rakstrarroknskapur 1. halvár

| Nota | | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 34.118 | 36.778 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 5.458 | 8.370 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **28.660** | **28.408** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 3.997 | 4.990 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 255 | 152 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **32.402** | **33.246** |
| | | | |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 2.611 | -71 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 716 | 861 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 24.949 | 23.977 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 666 | 665 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 25 | 1.387 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 480 | 1.814 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **9.609** | **6.193** |
| | | | |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **9.609** | **6.193** |

# Fíggjarstøða hin 30. juni

| Nota | | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK | Ársendi 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 49.756 | 254.616 | 227.903 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 58.440 | 28.527 | 51.191 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.645.581 | 1.546.546 | 1.597.659 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 455.003 | 196.370 | 271.315 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 10.121 | 15.194 | 10.187 |
| | Partabrøv o.a. | 11.521 | 10.390 | 10.433 |
| | Fastognir íalt | 21.748 | 23.686 | 22.652 |
| | Íløguognir | 7.566 | 8.633 | 7.559 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 14.182 | 15.053 | 15.093 |
| | Aðrar materiellar ognir | 7.819 | 8.372 | 8.162 |
| | Útsett skattaáogn | 5.400 | 0 | 5.400 |
| | Yvirtiknar ognir | 17.115 | 15.877 | 19.770 |
| | Aðrar ognir | 3.754 | 4.168 | 9.572 |
| | Tíðaravmarkingar | 0 | 443 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.286.258** | **2.104.188** | **2.234.244** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 0 | 12 | 0 |
| | Innlán | 2.040.196 | 1.868.966 | 1.973.325 |
| | Onnur skuld | 14.418 | 22.711 | 38.906 |
| | Tíðaravmarkingar | 323 | 289 | 333 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.054.937** | **1.891.978** | **2.012.564** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.116 | 2.208 | 2.116 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 93 | 181 | 93 |
| | Aðrar avsetingar | 0 | 0 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.209** | **2.389** | **2.209** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 17.331 | 14.279 | 16.470 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 176.272 | 163.548 | 163.848 |
| | Úrslit eftir skatt | 9.609 | 6.193 | 12.423 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 830 |
| | Gávugrunnur | 400 | 300 | 400 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **203.612** | **184.320** | **193.971** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.286.258** | **2.104.188** | **2.234.244** |
| | | | | |
| 8 | Aðrar skyldur | | | |

# Útgreining av eginpeningi og solvenstørvi

| | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK | Ársendi 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 16.470 | 10.727 | 10.727 |
| Tilgongd | 1.108 | 3.633 | 5.884 |
| Frágongd | -247 | -81 | -141 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **17.331** | **14.279** | **16.470** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 176.271 | 163.548 | 163.548 |
| Flutt frá gávugrunni, brúkt í árinum | 0 | 0 | 300 |
| Flutt úrslit | 9.609 | 6.193 | 12.423 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **185.881** | **169.741** | **176.271** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 830 |
| Gávugrunnur | 400 | 300 | 400 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **203.612** | **184.320** | **193.971** |
| | | | |
| **Kapital- og solvensuppgerð** | | | |
| Eginpeningur | 203.612 | 184.320 | 193.971 |
| Hálvársúrslit | -9.609 | -6.193 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -830 |
| Varslig meting av dagsvirði | -474 | 0 | -289 |
| Aktiverað skattaaktiv | -5.400 | 0 | -5.400 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **188.129** | **178.127** | **187.452** |
| | | | |
| Eginpeningur | 203.612 | 184.320 | 193.971 |
| Hálvársúrslit | -9.609 | -6.193 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -830 |
| Varslig meting av dagsvirði | -474 | 0 | -289 |
| Aktiverað skattaaktiv | -5.400 | 0 | -5.400 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 | 25.500 |
| **Basiskapitalur áðrenn frádrøg tilsamans** | **213.629** | **203.627** | **221.952** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.178.517 | 1.129.015 | 1.121.917 |
| Solvensprosent | 18,1 | 18,1 | 19,0 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,0 | 15,9 | 16,7 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kredittavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 10.756 | 14.861 | 13.329 |
| Marknaðarváði | 882 | 2.083 | 1.774 |
| Operationellur váði | 0 | 0 | 0 |
| Annar váði | 1.498 | 1.416 | 1.988 |
| Lógarkrøv | 94.281 | 89.893 | 89.753 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **107.417** | **108.253** | **106.844** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 9,1 | 9,6 | 9,5 |
| Solvensyvirdekningur (%-stig) | 9,0 | 8,5 | 9,5 |
| Solvensyvirdekningur (%) | 99 | 89 | 100 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 18,1 | 18,1 | 18,7 | 18,3 | 16,7 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,0 | 15,9 | 16,5 | 18,3 | 16,7 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 4,8 | 3,4 | 4,3 | 4,3 | 1,9 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 4,8 | 3,4 | 4,3 | 1,5 | 2,0 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,4 | 1,2 | 1,3 | 1,2 | 1,1 |
| Rentuváði | 3,3 | 2,9 | 1,7 | 3,0 | 1,7 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 0,3 | 0,7 | 0,3 | 0,3 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 82,4 | 85,0 | 88,0 | 93,3 | 104,8 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 169,0 | 154,1 | 199,6 | 143,8 | 136,4 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til basiskapital | 46,3 | 50,0 | 39,5 | 56,3 | 83,4 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 2,0 | 2,6 | 2,8 | 3,2 | 3,5 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | -0,1 | 0,1 | 0,1 | 0,3 | 0,3 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 3,0 | 0,8 | 0,6 | 2,5 | -1,4 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,1 | 8,4 | 8,9 | 9,4 | 9,0 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Netto rentuinntøkur | 28.660 | 28.408 | 31.060 | 32.810 | 35.027 |
| Netto kostnaðarinntøkur | 3.742 | 4.838 | 3.206 | 2.376 | 2.473 |
| Virðisjavnan | 2.611 | -70 | 960 | 2.418 | -1.284 |
| Aðrar inntøkur | 716 | 861 | 1.173 | 936 | 787 |
| **Inntøkur íalt** | **35.729** | **34.037** | **36.399** | **38.540** | **37.003** |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 25.640 | 26.029 | 26.789 | 26.213 | 28.427 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | 480 | 1.815 | 2.433 | 5.230 | 5.242 |
| **Útreiðslur íalt** | **26.120** | **27.844** | **29.222** | **31.443** | **33.669** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **9.609** | **6.193** | **7.177** | **7.097** | **3.334** |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 13 | 600 |
| **Úrslit** | **9.609** | **6.193** | **7.177** | **7.084** | **2.734** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.645.581 | 1.546.546 | 1.509.603 | 1.517.927 | 1.601.290 |
| Virðisbrøv | 476.645 | 221.954 | 207.316 | 191.764 | 189.303 |
| Innlán | 2.040.194 | 1.868.966 | 1.767.577 | 1.629.931 | 1.586.154 |
| Javni | 2.286.258 | 2.104.188 | 2.012.538 | 1.893.149 | 2.134.987 |
| Eginpeningur | 203.612 | 184.320 | 169.082 | 162.039 | 177.736 |
| Ábyrgdir | 69.507 | 52.760 | 49.769 | 43.050 | 45.731 |

# Notur

| Nota | | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 25 | 45 |
| | Útlan | 33.095 | 35.642 |
| | Lánsbrøv | 1.048 | 1.091 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **34.118** | **36.778** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 19 | 5 |
| | Innlán | 4.408 | 7.339 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 1.031 | 1.026 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **5.458** | **8.370** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 19 | 15 |
| | Gjaldstænastur | 1.087 | 1.008 |
| | Lánisakskostnaður | 1.307 | 1.395 |
| | Provisión av ábyrgdum | 704 | 462 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 880 | 2.110 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **3.997** | **4.990** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 2.705 | -384 |
| | Partabrøv | -113 | 301 |
| | Gjaldoyra | 19 | 12 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **2.611** | **-71** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.042 | 1.000 |
| | Nevnd | 400 | 400 |
| | Umboðsráð | 79 | 70 |
| | **Tilsamans** | **1.521** | **1.470** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 9.814 | 9.286 |
| | Eftirløn | 1.687 | 1.658 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.898 | 1.730 |
| | **Tilsamans** | **13.399** | **12.674** |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 10.029 | 9.833 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **24.949** | **23.977** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 42,7 | 41,8 |

# Notur

| Nota | | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK | Ársendi 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán v.m. | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 31.765 | 37.079 | 37.078 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 2.065 | 5.770 | 9.672 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -2.622 | -3.181 | -5.496 |
| | Avskrivað (staðfest tap) | -2.066 | -2.916 | -9.489 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **29.142** | **36.921** | **31.765** |
| | Niðurskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 93.966 | 105.076 | 100.820 |
| | Individuellar niðurskrivingar tilsamans | -29.142 | -36.921 | -31.765 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **64.824** | **68.155** | **69.055** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 5.715 | 5.979 | 5.979 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 366 | 270 | 928 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -552 | -893 | -1.192 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar tilsamans** | **5.529** | **5.356** | **5.715** |
| | Niðuskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 1.586.286 | 1.483.747 | 1.534.319 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar tilsamans | -5.529 | -5.356 | -5.715 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **1.580.757** | **1.478.391** | **1.528.604** |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **34.671** | **42.277** | **37.480** |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 93 | 189 | 189 |
| | Burturleggingar í árinum | 0 | 0 | 43 |
| | Afturførdar burturleggingar | 0 | 8 | -139 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir tilsamans** | **93** | **181** | **93** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **34.764** | **42.458** | **37.573** |

# Notur

| Nota | | 2016<br>1.000 DKK | 2015<br>1.000 DKK | Ársendi 2015<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán (framhald) | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | -557 | 2.758 | 4.176 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | 0 | -8 | -96 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | -186 | -624 | -264 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -604 | -751 | -1.546 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 322 | 509 | 2.143 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -117 | -70 | -441 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 1.622 | 0 | 653 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **480** | **1.814** | **4.623** |
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 455.003 | 196.370 | 271.315 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 10.121 | 15.194 | 10.187 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **465.124** | **211.564** | **281.502** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 107 | 217 | 95 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **465.231** | **211.781** | **281.597** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 6.414 | 6.220 | 6.359 |
| | Tapsábyrgdir | 7.460 | 5.426 | 7.627 |
| | Aðrar skyldir | 55.633 | 41.114 | 49.569 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **69.507** | **52.760** | **63.555** |

www.ns.fo